# Gallakonsert í Norðurlandahúsinum Føroya Symfoniorkestur og Havnarkórið

**Hósdagin 8. mai eru tjúgu ár liðin síðani Norðurlandahúsið lat upp dyrnar. Í hesum sambandi verður gallakonsert í Høllini um kvøldið og mentunarpolitiskt kjak í Klingruni um dagin. Fleiri onnur tiltøk verða fyrskipaði í sambandi við 20 ára dagin.**



Føroya Symfoniorkestur hevur til 20 ára dag Norðurlandahúsins 8. mai valt sum føðingardagsgávu eitt stórbært blómutyssi av tónleiki úr seks norðanlondum: Íslandi, Føroyum, Noregi, Danmørk, Svøríki og Finnlandi. Øll eru hetta verk, sum eru umboðandi fyri londini, ella teirra størstu tónaskøld. Verkini eru "Festmarsj" eftir Páll Isolfsson úr Íslandi, "Helios-Ouverturan" eftir Karl Nielsen úr Danmark, "Våren" eftir Edvard Grieg úr Noregi, "Midsommarvaka" eftir Hugo Alfven úr Svøríki, "Finlandia" eftir Jean Sibelius úr Finnlandi og "Eg oyggjar veit" úr sonevndu Højgaard-svituni. Martin Mouritsen stjórnar Føroya Symfoniorkestri.

Havnarkórið fer eisini at heilsa Norðurlandahúsinum á 20 ára degnum. Tað verður við enn einum úrvali av norðurlendskum sangum. Framførdir verða tveir Kingo sálmar og tveir sangir eftir ávikavist Vagn Holmboe og Sunleif Rasmussen. Høvuðsparturin í sangskránni hjá Havnarkórinum verður tó kantatan "Brúgvar", sum varð skrivað til Norðurlandahúsið, tá tað lat upp í 1983. Tekstin eigur Karsten Hoydal og Vagn Holmboe tónsettið. Havnarkórið fer eisini at syngja, tá Symfoniorketrið spælir "Eg oyggjar veit" úr Højgaard-svituni. Ólavur Hátún stjórnar Havnarkórinum.

Umframt sang og tónleik, verða eisini røður fluttar fram á tjúga ára degi Norðurlandahúsins. Røðarar verða Helvinn Høst formaður í stýrinum fyri Norðurlandahúsið, Høgni Hoydal landsstýrismaður í menta- og norðurlandamálum og Per Unckel aðalskrivari í Norðurlendska Ráðharraráðnum. Per Unckel er fyrrverandi svenskur granskingarmálaráðharri og tók fyri stuttum við sum nýggjur aðalskrivari í Ráðharraráðnum, sum heldur til í Keypmannahavn.

Gallakonsertin í Norðurlandahúsinum verður hóskvøldið hin 8. mai klokkan 19:30.

## 1. mai - Altjóða arbeiðaradagur

TÍÐINDASKRIV

Tað er ofta vandamikið at samskipa arbeiðsfelagar sínar til tess at skapa betri kor. Í flestu londum er vandin, at tú kanst missa arbeiðið og livíðbreyðið - tó ikki lívið. Í Columbia er slíkt arbeiði lívshættisligt. Fakfelagssamgongan í Columbia, CUT, roknar við, at í minsta lagi 172 fakfelagslimir vóru myrdir í 2002. Afturat hesum vóru 164 hóttir eftir lívinum, 26 burturfluttir og roynt varð at burturflyta aðrar 17. Tilvildarligar handtøkur raktu 132 aktivistar og fleiri en 80 flýddu av landinum. Sambært CUT eru hesi brot ein beinleiðis avleiðing av arbeiðinum hjá aktivistunum.

Til ber at lesa nógv meira um støðuna hjá fakfelagsfólki í Columbia og aðra staðni í heiminum á heimasíðuni hjá Amnesty http://www.amnesty.fo, har slóð er til tilfar á svenskum og enskum. Heitt verður m.a. á øll fakfelagsfólk um at gera sítt til at bøta um umstøðurnar hjá fakfelagsfólki í londum við verri umstøðum enn okkara. Hetta kann t.d. gerast við at senda brævauppskotini, sum liggja á svensku síðuni.

# Fundur um tilkallingarskipanina

TÍÐINDASKRIV

Tann 28. apríl 2003 var fundur hildin á politistøðini í Tórshavn, har spurningar um tilkallingarskipanina til sløkkiliðini vóru viðgjørdir.

Við á fundinum vóru umboð fyri politiið, tilbúgvingarsamskipanina, Føroya Tele og Brunaumsjón landsins.

Málið við hesum fundinum var at avtala, hvussu allir viðkomandi partar enn betur kunnu taka til eftirtektar og viðgera allar spurningar í sambandi við tilkallingar, tá eldsbruni hevur verið, - serliga um okkurt ikki hevur gingið so ræði, sum ynskiligt var.

Niðurstøðan á fundinum var, at ein bólkur umboðandi Politiið, Føroya Tele og Brunaumsjón landsins, kemur saman hvørja ferð tað er neyðugt at meta um møguligar afturmeldingar eftir eldsbruna, og skal hesin bólkurin síggja til, at rættað og betrað verður, har tað á nakran hátt ber til.

Setningurin framyvir skal sostatt verða, at tær royndir, sum sløkkiliðsmanningarnar hava fingið eftir eina tilkalling og eisini, at tær royndir, sum alarmsentralurin hevur eftir at fráboðan er gjørd, verða skrásettar og síðani viðgjørdar við tí fyri eyga at rætta brek, skeivleikar og misskiljingar, so hvørt hesi koma fyri.

Við hesum er enn eitt stig tikið til, at sokallaðar afturmeldingar frá sløkkiliðunum og royndir hjá alarmsentralinum verða skrásettar og tiknar til viðgerðar, til tess at hesin kunnleikin kemur til nyttu og verður brúktur til at betra um tilkallingarskipanina.

Fyri sløkkiliðsmanningarnar hevur hetta við sær, at tað hereftir er ynskiligt, at brunaumsjónarmaðurin í kommununi ella varamaður hansara kunnar alarmsentralin um, hvussu ein útkalling royndist, og hvussu tað gekst sløkkiliðsmanningini at fáa boð.

# Várkonsert við Glymi

TÍÐINDASKRIV

9. og 10. mei fer kórið Glymur at halda várkonsert í Mentunnarhúsinum í Fuglafirði og í Gl. Meiarínum í Havn.

Kórið hevur mong ár á baki, men tann kórleiðarin, sum fólk flest munnu seta í samband við Glym, man vera Jógvan Telling Joensen.

Til hesa konsertina fer kórið at syngja nakrar av songum Jógvans.

Glymur er eitt sokallað rútmiskt kór, og tað er skráin fyri konsertirnar eisini merkt av. Umframt Telling sangir, so er eisini slíkt sum The Beatles, SweDanes, Bobby McFerrin o.a á skránni.

Pauli Hansen stjórnar kórinum, eins og hann hevur gjørt seinastu tvey árini. Við klaverið situr Stamen Stanchev.

Konsertin í Mentunnarhúsinum í Fuglafirði verður fríggjadagin, hin 9.mei, kl. 20.00 Konsertin í Meiarínum í Havn verður leygardagin, hin 10.mei, kl. 16.00 Kostn. 80 kr.

# Børn í Norðurlandahúsinum

NORÐURLANDAHÚSIÐ

Børn hava altíð verið vælkomin í Norðurlandahúsið. Tey eru framtíðin og skulu frá barnsbeini venjast til at ganga í húsið, sum liggur høgliga fyri, beint við Svimjihøllina.

Hvørt fríggjakvøld í vetrarhálvuni er barnadansur í húsinum. Hetta tiltak hevur verið tað drúgvasta í søgu Norðurlandahúsins. Tí er sjálvsagt, at børn koma í húsið og gerast partur av virkseminum.

Við hesum í huga hevur Norðurlandahúsið gjørt serligan krók í kaffistovuni, ætlaður børnum. Her er runt borð við stólum í hóskiligari hædd, og her eru føroysk leiku og bøkur. Rúm er fyri átta børnum í hesum ljósa, dámliga horni í kaffistovuni.

Í sambandi við tjúga ára haldið hjá Norðurlandahúsinum vilja vit frá 1. mai 2003 heilsa Føroya børnum við hesum møguleika at vitja allar dagar, húsið er opið.

Við tað at rúm er fyri átta børnum hvørja ferðina, er neyðugt at leggja vitjanina til rættis. Ringið 317900 biðið um Kaffistovuni og spyrjið um borðið er tókt, tá tit ætla at vitja.

Nú Norðulandahúsið fer um tey tjúgu, verða eisini tiltøk, har serstakur avsláttur verður veittur børnum, 12 ár og yngri. Hesi tiltøk eru Musikkskúlakonsert fríggjadagin 9. mai klokkan 19:30, klassisk konsert leygardagin 10. mai klokkan 16:00 og familjukonsert sunnudagin 11. mai klokkan 15:00.

### Eingin royking í Norðurlandahúsinum

Royking á almennum støðum er eitt vandamál, sum øll kjakast um og helst hava eina meining um. Kann henda, at royking er hóskiligari á summum støðum, og ikki á øðrum støðum. Meiningarnar eru so ymiskar.

Stýrið fyri Norðurlandahúsið hevur havt hetta vandamál til viðgerðar. Eitt samt stýri hevur gjørt av, at eftir 1. mai 2003 skal Norðurlandahúsið verða lýst sum roykfrítt øki.

Til trivna fyri øll verður tí ikki loyvt at roykja í kafeteria og teim rúmum í Norðurlandahúsinum, har almenningurin kemur.

Øll tey, sum starvast í hesum opna og ljósa húsi vóna, at tikið verður væl í móti hesi avgerð stýrisins.



Sáttmálasamráðingar:

# Semingsstovnurin boðsendur

**Tað stendur ógvuliga langt ímillum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevarafelagið, nú samráðingar um nýggjan sáttmála eru farnar í gongd. Mikukvøldið klokkan 11 sendi arbeiðsgevarafelagið boð eftir semingsstovninum, tí ósemjan var ov stór**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Stefan í Skorini*



*Einki verkfall verður fyrr enn 7.mai, tí verandi sáttmáli er longur eina viku. Mikukvøldið var semingsstovnurin boðsendur, tí ov langt var millum partarnar*

*Savnsmynd*

Í gjár, hósdagin 1. mai, vóru ongar samráðingar millum arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag, tí alheims arbeiðaradagurin skuldi hátíðarhaldast.

Partarnir eru tó komnir ásamt um at leingja verandi sáttmála við einari viku, so at einki verkfall verður fyrr enn eftir 7.mai. Hósdagin vóru semingsmenninir á fundi við arbeiðsgevararnar, og fríggjadagin skuldu teir fundast við arbeiðarafeløgini.

### Langt ímillum partarnar

Ingeborg Winther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, slær fast, at tað stendur ógvuliga langt ímillum partarnar.

- Vit krevja eina lønarhækkan uppá 16 krónur og 45 oyru yvir tvey ár. Vit skulu ikki hava minni lønarhækkan enn Maskinmeistarafelagið, tí teir hava lagt støðið, sigur Ingeborg Winther.

Arbeiðsgevararnir hava boðið feløgunum eina lønarhækkan uppá 2,5 %. Hetta svarar til einar 4-5 krónur.

- Tað kemur als ikki uppá tal at taka av tilboðnum frá arbeiðsgevarunum. Um vit halda fram við at rokna i prosentum gerst gjógvin millum lønirnar bara størri fyri hvørja samráðing, sum fer afturum bak, og tað kunnu vit ikki góðtaka, sigur forkvinnan í FA.

Spurd um hon heldur, at arbeiðsgevararnir yvirhøvur eru førir fyri at geva so stóra lønarhækkan, sigur Ingeborg, at hesum ivast hon ikki í, tí búskaparvøksturin hevur verið ómetaliga stórur seinastu árini, men tey einastu, sum ikki hava merkt nakað til hetta, eru hennara limir í framleiðsluvinnuni.

Hon fegnast samstundis um, at øll arbeiðarafeløgini standa saman undir hesum samráðingunum, tí hetta gevur teimum størri slagkraft, og størri trýst kann leggjast á arbeiðsgevararnar enn við seinastu samráðingar, tá Havnar Arbeiðsmannafelag samráddist fyri seg.

Sterkasta vápnið, sum arbeiðararnir hava, er verkfallið, og hóttanin um verkfall gerst enn meira ræðandi fyri arbeiðsgevararnar, tá ein samlað arbeiðsstyrki leggur arbeiðið niður.

Tað eydnaðist ikki blaðnum at fáa eina viðmerking frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, áðrenn blaðið fór til prentingar, tí tey sótu á fundi við semingsstovnin.

# Argjafólk gleða seg til rundkoyring



*Menn frá kommununi eru farnir í gongd við rundkoyringina, sum skal minka um tær longu bilarøðirnar av Argjum. Hon verður væntandi liðug í hesum mánaðinum*

*MYND: Jens Kr. Vang*

**Nú verður bíðirøðin hjá argjafólki, sum skulu til Havnar at arbeiða um morgnarnar, skjótt styttri. Rundkoyringin, sum hevur verið á tekniborðinum leingi, er við at taka skap, og ætlanin er, at arbeiðið skal vera liðugt síðst í hesum mánaðinum**

FERÐSLA
*Stefan í Skorini*

Leingi hava argjafólk ilskast um tær longu bíðirøðirnar av bilum, ið hava staðið frá J.C. Svabosgøtu og omaneftir Dr. Dahlsgøtu og yvirum Sandá. Bilarnir eru ikki slopnir inn á høvuðsvegin, tí tann nógva ferðslan um morgnarnar hevur forðað hesum.

Nú er arbeiðið uppá eina rundkoyring, sum skal fáa ferðsluna at glíða meira smidliga, langt um leingi farið í gongd, og rundkoyringin verður skjótt veruleiki. Hetta munnu tey flestu argjafólkini gleðast stórliga um.

Tað er vorðið alt meira vanligt at nýta rundkoyringar fyri at loysa teir ringastu ferðsluknútarnar, og hendan loysnin vísir seg at rigga avbera væl.

### Liðugt í mai

Býarverkfrøðingurin Boði Haraldson sigur, at arbeiðið eftir ætlan verður liðugt síðst í mai mánaði. Ein slík rundkoyring kostar eina slaka millión at gera.

Hann sigur, at kommunan eisini ætlar at gera nakrar forðingar, so at bilar, ið koyra omaneftir Velbastaðvegnum verða noyddir at minka um ferðina.

Ein slík rundkoyring fer at stytta munandi um bíðitíðina hjá einum, ið kemur av Argjum, men hinvegin verður bíðitíðin longri hjá teimu, ið koyra eftir Velbastaðvegnum og J.C. Svabosgøtu. Nú verður bíðitíðin javnt deild út til allar bilførarar.

Hann leggur dent á, at tað er týðandi at minka um stressfaktorin hjá bilførarum, og tað er endamálið við hesi rundkoyringini.

# Summarmótin sýndur fram í SMS

Sølumiðstøðin í Havn hevði mikukvøldið mótaframsýning á torginum í SMS, har tann nýggjasti summarmótin varð sýndur fram.

Sýnd vórðu fram løtt summarklæðir í løttum og ljósum litum. Talan er millum annað um berar nalvar og nettroyggjur, sum eftir øllum at døma fara at eyðkenna summarmótan í ár. Hetta gav mótaframsýningin í SMS mikukvøldið í øllum førum ábendingar um.

Nógvur áhugaverdur móti var at síggja á framsýningini fyr tey, sum ætla sær at vera moderna í summar.



*Summarklæðini verða løtt og ljós, og tað seinasta nýggja er eftir øllum at døma nettroyggjur*